# Føroyskur listgrafikkur í Íslandi

**Leygardagin tann 3. oktobur letur framsýning upp í Gallarí Snærós við føroyskum listgrafikki. Framsýningin er onnur í røðini av norðanlondum og er ætlanin at øll norðurlendsk lond skulu framsýna grafikk á gallarínum**

FRAMSÝING
*Tíðindaskriv*

Listgrafiska framsýningin er kuraterað av Rikharði Valtingojer og sýnir myndir hjá átta føroyskum listafólkum. Tey føroysku listafólkini á framsýningini eru: Jóhan Martin Christiansen, Oggi Lamhauge, Tróndur Patursson, Rannvá Holm Mortensen, Marius Olsen, Kári Svensson, Bárður Jákupsson og Jóna Rasmussen. Tað er nokk fyrstu ferð at hesi átta listafólkini sýna fram saman.

Hjúnini Rikharður Valtingojer, listgrafikari og Sólrún Friðriksdóttir, listakvinna, lótu í 1988 upp Gallarí Snærós í Stöðvarfirði, Ísland.

Rikharður Valtingojer varð lærari á Myndlista- og Handiðaskóla Íslands og síðan í Listaháskúla Íslands í mong ár. Tá hann fór frá við eftirløn fór hann til Noreg og uppbygdi har eitt hitt størsta listgrafiska verkstaðið í norðanlondum. Heimafturkomin í 2007 víðkaði hann, saman við konu síni um gallaríið og gjørdi eina listgrafiska miðstøð. Umframt listgrafikk arbeiðir Rikharður eisini við silvursmíði og varð í ungum aldri útbúgvin silvursmiður. Dóttir Rikharður og Sólrún, Rósa er eisini listakvinna og arbeiðir við leirlist.

Í samband við listgrafisku framsýningina hevur Rikharður Valtingojer gjørt eitt serligt katalog við myndum av prentum, og við teksti um listafólkini.

Framsýningin letur upp 3. oktobur og heldur áfram til 9. november.

Síðan fer framsýningin til Reykjavíkar, og verður at síggja í hølinum hjá Íslands Grafik frá 25. februar til 14. mars.




# Eftirlønin úr Samhaldsfasta hækkar 100 krónur

EFTIRLØN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Stýrið fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin hevur samtykt at hækka eftirlønina úr grunninum við umleið 4,0% frá 1. januar 2010, soleiðis at eftirlønin verður 2.600 krónur um mánaðin, sum er 31.200 krónur um árið. Ásetingin er galdandi fyri árið 2010.

Løgtingslógin um eftirlønargrunnin er frá 1991, men hon er broytt nakrar ferðir. Lógin ásetir, at stýrið fyri grunnin skal áseta útgjaldið eina ferð um árið fyri álmanakkaárið eftir.

Løgtingslógin er seinast broytt tann 28. apríl 2009 við virknaði frá 1. juli. Øll, sum fingu eftirløn áðrenn henda dag, fáa nú fulla eftirløn. Tann, sum verður 67 ár aftaná 1. juli, sum býr í Føroyum, og sum hevur búð her í 40 ár ella meira millum 15 og 67 ára aldur, fær fulla eftirløn. Hevur hann búð í minni enn 40 ár, fær hann brotpensjón millum 3/40 og 39/40.

Tann persónur, sum hevur búð í Føroyum í meira enn trý ár, tá hann var millum 15 og 67 ára aldur, sum býr uttanlands, tá hann fyllir 67 ár, ella flytir uttanlands aftaná at hava fylt, kann søkja um at fáa eftirløn.

Lønmóttakarar og arbeiðsgevarar hava síðan 1. januar 1992 goldið í grunnin. Lønmóttakarar og arbeiðsgevarar rinda ein prosentpart av ávikavist a-inntøkuni og útgoldnu lønini, so hvørt lønin verður útgoldin. Arbeiðsgevarar kunnu tó velja at rinda so hvørt, lønin verður útgoldin, annars fáa teir rokning fyri undanfarna árið. Frá 1. januar 2008 hava lønmóttakarar og arbeiðsgevarar rindað hvør 1,75% av lønini.

Persónar rinda ikki í grunnin aftaná at hava fylt 67 ár. Persónar, sum ikki hava búð í Føroyum fyrr og sum flyta higar eftir at hava fylt 64 ár, rinda ikki í grunnin.

Eftirlønarveitingin er ásett soleiðis, at grunnurin sleppur undan at lække hana seinni, og í staðin fyri hevur møguleika fyri at lata eina vaksandi upphædd, sum í minsta lagi veksur líka nógv sum inflatiónin.

# Ráðstevnan um minnilutar í filmi og sjónvarpi

**- Eru samkyndir íslendskir wrestlarar ólukkuliga forelskaðir? Fá svarið á ársins Nordisk Seminar, ið verður hildið í Grønlendska húsinum í Keypmannahavn um vikuskiftið**

NORDISK SEMINAR 2009
*Tíðindaskriv*

Her hittast 50 ung úr øllum norðurlondum eitt vikuskifti fyri at kjakast um evni sum minnilutar, norðurlendskar og nasjonalar identitetar og hvussu hesir verða lýstir í filmi og sjónvarpi. Ráðstevnan er fyriskipað av FNU Danmark – Foreningen NORDENs Ungdom.

Ráðstevnan byrjar fríggjakvøld við íslendska filmserfrøðinginum Birgir Thor Møller (frá m.ø. Norðurbryggjuni), ið introduserar lýsingina av identitetum í norðurlendskum filmum og sjónvarpssendingum. Hann vísir eisini filmbrot og ein stuttfilm.

Ráðstevnan leygardag er opin fyri øll og verður hildin í Grønlendska Húsinum. Á skránni er ummælarin og rithøvundurin Bo Tao Michaëlis, ið heldur fyrilestur um norðurlendskar filmar, filmsleikstjórin Ivalo Frank, ið sýnir og greiðir frá um dokumentarfilm sín "Tro Håb og Grønland", og løgtinglimur og speirekari Sjúrður Skaale, ið fer at tosa um útisetar og føroyingar sum minnilutar. Og ikki minst Harald!

Umframt fyrilestrarnar verður leygardagin ein workshop, og kvøldið endar við einari veitslu við grønlendskum mati, norðurlendskum undirhaldi og finskari mini-konsert. Sunnudag endar vikuskiftið við sýning av og kjaki um satiru umframt rundvísing á Nordisk Film.

STARVSLÝSING

## Landsverk søkir avloysara til fíggjardeildina

**Arbeiðsuppgávur**
Tú fært ábyrgdina av allari debitorrøktini hjá stovninum, og verður høvuðsuppgávan tí málsviðgerð av debitorunum hjá stovninun. Hetta inniber millum annað at tryggja, at allar debitoravtalur verða hildnar, at hava eftirlit við eftirstøðum, at senda krøv til innheintingar og at gera gjaldsavtalur við debitorar. Harumframt kemur tú at fyrisita debitorskránna, umframt at aðrar fyrifallandi uppgávur, ið ein fíggjardeild hevur, koma fyri.

**Førleikakrøv**
Tað er ein treyt, at tú hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi og viðkomandi royndir á økinum. Tú skalt hava góðan telduførleika, t.e. kunnleika innan tekstviðgerð og rokniark. Tað er ein fyrimunur, um tú dugir at nýta Navision og BSL (Búskaparskipan Landsins).

Vit vænta, at tú dugir væl at samskifta – bæði munnliga og skrivliga. Sum persónur ert tú samstarvandi, arbeiðsamur, dugnaligur og væl skipaður. Tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert fyrikomandi og ein arbeiðsglaður viðleikari, ið gevur eitt jaligt íkast til arbeiðsplássið.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt avloysarastarv, ið varir í eitt ár. Arbeiðstíðin svarar til 81 % av einum fulltíðarstarvi. Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postboks 78,
110 Tórshavn,

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 9. oktober 2009, kl. 12.00.

Merkið umsóknina „Umsókn til fíggjardeildina". Vinarliga viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árant Andriasson, fíggjarleiðara, á tlf. 540 821 ella arant@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlikaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*